# Krøv verða sett til arbeiðsfólk í tunlunum

**- Hóast onga ætlan um tilbúgving og hóast menn vanta venjing, gekst væl at basa eldinum í Norðskálatunlinum í farna mánaði! Tað er niðurstøðan av einum fundi eftir eldsbrunan, har mett varð um innsatsin hjá øllum pørtum í sløkkingini. Men ávísir førleikar og ávís vitan verða hereftir kravd av teimum, ið arbeiða í tunlunum**

ELDSBRUNI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Hóast tað sá ógvusligt út og fyri mong kendist ørkymlandi, eydnaðist arbeiðið væl at sløkka eldsbrunan í Norðskálatunlinum í januar mánaði*

**Norðskálatunnilin:** Tað ljóðaði ógvusligt og ørkymlandi, tá boðað varð frá hesum eldsbrunanum.

Klokkan var 15:04 henda týsdagin 9. januar, tá tann fyrsta fráboðanin kom um ein eldsbruna inni í sjálvum tunlinum.

Teir næstu fimm minuttirnar fekk løgreglan fleiri fráboðanir um tað sama. Staðfestast kundi, at eldur var komin í eitt ljósaggregat, hagani eldurin breiddi seg til annað tilfar í nánd av hesum.

Tunnilin varð beinanvegin stongdur, so at sløkkiliðini í Sundalagnum og við Skálafjørðin fingu arbeitt seg fram til víkiplássið, har eldurin var byrjaður.

Slakar tríggjar tímar seinni - kl. 17:50 - høvdu teir bast eldinum og fóru undir uppruddingina, soleiðis at tunnilin kundi lata upp dagin eftir.

Vikudagin eftir hittust umboð fyri Skálafjarðar og Sunda Sløkkilið, løgregluna, Landsverk og Brunaumsjón Landsins til ein fund at eftirmeta tilburðin.

Hóast menn ikki eru vanir við slíkt sløkkiarbeiðið, var semja um at innsatsurin hevði verið góður.

- Eg kendi meg púra tryggan, og hevði fullkomuliga álit á tilbúgvingini, segði løgreglumaðurin Eyðbjørn Eldevig á fundinum.

Og hann legði aftrat: - Vit eru før fyri at taka slíka uppgávu, og eiga vit at gleðast um tað!

### Ein ætlan hevði gjørt mun

Á heimasíðu sínari greiða tey hjá Landsverki frá, at øll hendingin henda seinnapartin varð gjøgnumgingin minutt fyri minutt.

Á fundinum, sum varð hildin í Eydnuni á Oyrarbakka har eini 30 fólk vóru við var semja um, at innsatsurin hevði gingið róliga fyri seg.

- Teir sum tóku lut kendu seg tryggar, meðan arbeiðið fór fram. Samstarvið og samskiftið millum partarnar gekk eisini væl, skiltist á fundarfólkinum.

Semja var kortini um, at ein tilbúgvingarætlan fyri sjálvan tunnilin hevði gjørt stóran mun. Var ein slík til taks, høvdu allir partar tá kent tunnilin og leiklutin hjá hvørjum øðrum mundandi betri.

Tí kom eisini fram eitt ynski um at hava fleiri venjingar í tunlunum og at neyðugt er at upplýsa tey ferðandi um, hvat rætt er at gera í eini kreppustøðu um tað gerst neyðugt.

### Fyri allar tunlar

Endamálið við at hava eina tilbúgvingarætlan er at tryggja eitt best møguligt átak, um eitt óhapp skuldi hent í einum tunli sum t.d. honum við Norðskála.

- Av tí at eitt óhapp í einum tunli krevur at fleiri partar seta inn, er neyðugt at ein tilbúgvingarætlan skal fastleggja bæði førleika og arbeiðsgongdir í bjargingararbeiðinum, varð sagt.

Higartil hevur tað verið so, at tilbúgvingarætlanir eru gjørdar til allar nýggjar tunlar í landinum, og í sambandi við teir tunlarnar sum verða dagførdir, tí hesir hava alla ta neyðugu trygdarútgerðina.

Í hesum døgum verður arbeitt við at dagføra júst Norðskálatunnilin, og verður samstundis arbeitt við eini tilbúgvingarætlan fyri henda.

Henda ætlanin verður liðug seinni í vár, og er ætlanin at royna hana í verki beinanvegin við eini venjing í tunlinum.

### Førleikar til arbeiðsfólkini

Tey hjá Landsverki ætla tó ikki at steðga her.

Farið verður nú undir at kanna møguleikan fyri at gera slíkar ætlanir fyri allar tunlar í landinum. Hesar ætlanir umfata eisini teir tunlarnar sum onga trygdarútgerð hava í dag.

- Á henda hátt fær ein gjøgnumgingið allar mannagongdir og øll ábyrgdarøki í arbeiðinum, eins og vit fáa havt venjingar í tunlunum.

- Júst hetta eftirlýstu sløkkiliðini bæði, verður sagt.

Landsverk og Brunaumsjónin fara nú at gera eina skitsu til eina trygdarætlan fyri arbeiðstakarar í tunlunum kring landið. Hetta verður gjørt aftrat teimum treytum sum Arbeiðseftirlitið vanliga setir.

Framyvir verður kravt av øllum sum skulu arbeiða í tunlunum, at tey hava ávísar førleikar og vitan um mannagongdir í sambandi við tilkalling, útgerð í tunlunum, fyrstuhjálp, eldsløkking og annað.

Landsverk hevur gjørt ein faldara um trygga atferð, tá koyrt verður í tunlunum. Heitt verður á bilførarar um at hava ein slíkan liggjandi í bilinum.

Hesin faldarin fæst á fleiri bensinstøðum kring landið.

> *Ein tilbúgvingarætlan fyri sjálvan tunnilin hevði gjørt stóran mun. Allir partar í tilbúgvingararbeiðnum høvdu tá kent tunnilin og leiklutin hjá hvørjum øðrum betri*

> *Teir sum tóku lut kendu seg tryggar, meðan arbeiðið fór fram. Samstarvið og samskiftið millum partarnar gekk eisini væl*

## Niðurstøður frá eftirmetingini

Á fundinum 16. januar varð komið fram til hesar niðurstøður eftir eldsbrunan í Norðskálatunlinum: - Hóast ongin tilbúgvingarætlan var fyri tunnilin, og at sløkkiliðini mangla venjing í sløkking av eldi í tunli, gekk "innsatsurin" í Norðskálatunlinum eftir umstøðunum væl. - Ein tilbúgvingarætlan fyri sjálvan tunnilin hevði gjørt stóran mun. Allir partar í tilbúgvingararbeiðnum høvdu tá kent tunnilin og leiklutin hjá hvørjum øðrum betri. - Venjingar í tunlum eru neyðugar. - Tekningar og merkingar av tunlinum eru ein hjálp í tilbúgvingararbeiðnum. - Upplýsing til tey ferðandi um, hvat er rætt at gera í eini kreppustøðu er neyðug.